TIL ARBEIÐIS

LAGT TIL RÆTTIS: Vilmund Jacobsen



MYND: VILMUND JACOBSEN

FAKTA

**Navn:** Byrgerð Kjærbæk
**Starv:** Handilskvinna
**Besta við starvinum:** At hitta viðskiftafólk
**Ringasta við starvinum:** Eg trívist bara...
**Starvstíð:** Síðan mars 2009
**Starvsfólk:** 3, pluss skúla-næmingar
**Staður:** Saltangará
**Stjóri:** Lars Müller

# Úr klipping í klæðir

TÁ VIT RINGJA TIL HENNARA, ER HON JÚST Í HOLT VIÐ AT **KLIPPA** MANNI SÍNUM. HANN ER **SKIPARI** UMBORÐ Á **NORRØNU** Í SKIFTI VIÐ HENRIK HAMMER. – NÚ KLIPPI EG BARA TEIMUM ALLAR NÆRMASTU, SIGUR **BYRGERÐ KJÆRBÆK**, SUM HEVUR VERIÐ **HÁRFRÍÐKANARKVINNA** Í MONG ÁR, MEN SUM NÚ SELIR KLÆÐIR Í SALTANGARÁ

Hon var bara 17 ára gomul, tá hon fór í læru sum hárfríðkanarkvinna og hevur flestu árini, síðan hon fekk sína útbúgving í 1981, arbeitt við hesum handverki. Fyri hálvum øðrum ári síðan valdi hon sær eina aðra yrkisleið, tá hon byrjaði í starvi hjá handlinum, Sportmaster í Saltangará. Hon var við longu, tá Lars Müller læt handilin upp hin 4. mars í fjør, og hon var eisini við, nú fýra handlar hjá sama eigara lótu upp undir somu lon í bygninginum, har Klement Petersen áður húsaðist í Saltangará. Nú er tað Borg, sum eigur hølini, men Lars Müller eigur handlarnar, Sportmaster, Skálk, Gelluna og Name It, sum nú allir eru undir einum taki.

Kvinnan, vit hesaferð hava tosað við, er Byrgerð Kjærbæk. Hon er ættað av Glyvrum og gift vágbinginum, Sverra Kjærbæk, sum í skifti við Henrik Hammer er skipari umborð á Norrønu. Tey eiga trý børn, Ásbjørg (19), Andreas (16) og Elinu (8).

## Ikki stundir at klippa

– Eg eri akkurát í holt við at klippa manni mínum, sum fer við Norrønu á fyrsta túrin til Hirtshals í morgin, men eg ringi aftur, tá eg eri liðug.

Soleiðis byrjar samrøðan, tá vit ringja til hennara mikukvøldið, eftir at allir fýra handlarnir lótu upp í Saltangará júst hendan dagin.

Løtu seinni tosa vit saman aftur.

– Nú klippi eg bara teimum allar nærmastu. Tá tú arbeiðir úti ein langan dag, noyðist tú at leggja orkuna í hetta. Tá ber ikki til at klippa í frítíðini, tú hevur, sigur hon.

Nøkur ár herfyri arbeiddi Byrgerð í eitt ár ella so í handlinum, Teir & Tara, sum Hans Anton Thomsen, sáli, hevði í Havn, og soleiðis hevði hon roynt hendan partin av handilslívinum, áðrenn hon byrjaði í starvinum hjá Sportmaster.

– Tá tú ert hárfríðkanarkvinna, hevur tú eisini handilsloyvi, tú selir vørur, og tú veitir viðskiftafólki tænastu. Tí er tað eftir mínum tykki ikki so langt lop at klippa, gera hár, selja vørur – og so at arbeiða í einum handli og veita fólki tænastu har. Mær dámar væl at hava við fólk at gera, og tað er áhugavert at samskifta við eitt og eitt fólk í senn, tá ræður um vegleiðing og keyp av vørum.

Byrgerð sigur, at síðan Sportmaster læt upp í Saltangará, hevur hon sæð, at nógv viðskiftafólk vitja aftur.

– Vit hava eisini avtalur við fleiri ítróttarfeløg um keyp av ítróttarklæðum, skógvum og øðrum. Í útboðnum hjá Sportmaster annars eru ítróttarklæðir, svimjiklæðir, fótbóltsskógvar til uttandura-og innandurabrúk, renniskógvar, bóltar og ymiskt annað, sum hoyrir ítróttini og frítíðini til.

## Stór virðing fyri Lars

Nú fýra ymiskir handlar húsast undir somu lon við útboði av klæðum til bæði vaksin og børn, heldur hon, at handilsumhvørvið fer at gerast uppaftur meiri spennandi og læruríkt, bæði fyri tey, sum í felag starvast her, men eisini fyri viðskiftafólkini.

– Vit, sum nú arbeiða saman, hava ymiskar førleikar og kunnu tí læra av okkum til hvønn annan. Hetta verður gevandi fyri okkum og fyri okkara viðskiftafólk, sum vit skulu vegleiða og annars veita bestu tænastu, sigur Byrgerð Kjærbæk.

Hon sigur seg vera sera spenta upp á økta virksemi, sum Lars Müller nú er farin undir í Saltangará.

– Eg havi stóra virðing fyri 35 ára gamla manninum, sum nú hevur sjey handlar í SMS og fýra í Saltangará. Hann er góður arbeiðsgevari, sum veit, hvat hann vil. Tá tú sjálv hevur fingist við vinnuligt virksemi og hevur havt fólk undir tær, veitst tú eisini, hvat tað er, sum ein arbeiðsgevari ynskir av tær. Eg trívist væl í mínum starvi, sum eg vænti ikki verður minni spennandi og læruríkt nú, sigur Byrgerð.

## Lærdi í Vágsbotni

Tað ljóðar kanska eitt sindur serstakt, at Byrgerð Kjærbæk fór í læru hjá Elmari Ellingsgaard, sum var harrafrisørur í Vágsbotni í Havn.

– Eg var soleiðis í læru á eini harrasalong. Mín læra snúði seg tó ikki bara um at klippa mannfólki. Á skúlanum noyddist eg at taka prógv í øllum, og soleiðis er mín útbúgving háfríðkanarkvinna – ella tað handverk, sum tað er at vera frisørur í breiðari merking.

Byrgerð sigur, at flestu viðskiftafólkini í salongini í Vágsbotni vóru mannfólk, men onkur kvinna var ímillum.

– Í frítíðini klipti eg eisini konufólki, sum kundu vera vinfólk ella fólk í familjuni, og soleiðis fekk eg eisini venjing í at klippa øðrum enn mannfólki, sigur hon.

Fleiri ár afturi í tíðini hevði hon hárfríðkanarstovu á Strondum í nøkur ár, og hon hevur eisini havt stóra hárfríðkanarstovu saman við øðrum í Saltangará.

– Seinnu árini arbeiddi eg í mínum egna kjallara heima við hús, men tá vit seldu húsini fyri tveimum árum síðan, gavst eg, tí hølisumstøður vóru ikki til at halda fram.

Byrgerð sigur, at tá tey seldu húsini, noyddist hon at gera upp við seg sjálva, um hon skuldi byrja av nýggjum í leigaðum hølum onkustaðni – ella, um hon skuldi royna okkurt annað.

– Umleið hálvt ár eftir, at vit seldu húsini, og eg soleiðis gavst at arbeiða sum hárfríðkanarkvinna, byrjaði eg hjá Sportmaster í Saltangará á vári í 2009.

Hon sigur, at hon framvegis eigur innbúgvið til hárfríðkanarstovu, men so væl, sum hon trívist í handilsvinnuni, hevur hon í løtuni ongar ætlanir um at fara aftur í gamla handverkið.

Byrgerð Kjærbæk, sum hevði barnanavnið Højgaard Lamhauge, er fødd hin 17. juli í 1963. Hon gekk barnaárini í skúla í Runavíkar kommunu, men tók 8., 9. og 10. flokk í Tofta skúla.